# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur hóskvøldið 6. juli**
***Norðoya Vistarheim:*** kl. 19.30, Hans Eiler Hammer

**4. sunnudag e. Trinitatis**
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00, Bjarni Bæk
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00, Heri Joensen
***Kvívík:*** kl. 12.00, Marjun Bæk
***Vestmanna:*** kl. 11.00 Hans Jákup Joensen, bispur
***Sørvágur:*** kl. 11.00, Sverri Steintún
***Kollafjørður:*** kl. 11.00, Inga Poulsen Dam
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11.00, Hanne Sander
***Æðuvík:*** kl. 16.00, Hanne Sander
***Gjógv:*** kl. 11.00 Messa, Emil Olsen
***Funningur:*** kl. 12.30 Messa, Emil Olsen
***Leirvík:*** kl. 11.00, altarg., Jón Poulsen, stud.theol. og Uni Næs
***Funningsfjørður:*** kl. 16.00, altarg., Uni Næs
***Klaksvíkar Sjúkrahús:*** kl. 10.00,
***Árnafjørður:*** kl. 12.00 altarg.,
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30, Hans Eiler Hammer
***á Húsum:*** kl. 11.00, altarg., Niels Pauli Danielsen
***Tvøroyri:*** kl. 11.00, altarg., Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri Føroysku sjómansmissiónina

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 25. juli hava Maureen og Petur Hammer, Tvøroyri, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í høllini í Trongisvági leygardagin 22. juli 2006 kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 10. juli á tlf. nr. 371637 og 284037.

Mánadagin 31. juli hava Henny og Óli Karl Olsen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00 sama dag. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 20. juli á tlf. 456719 ella 227322.

1. august hava Ann og Poul Jákup Mohr, Fuglafjørður, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík, leygardagin 5. august kl. 18.00. Tey, sum ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 22. juli á tlf. 444655.

**Brúdleyp**
8. juli giftast í Øse kirkju Hildigerð Johansen, Argir og Thomas Nielsen, Herning. Veitslan verður fyri innbodnum, Almevej 15, Nordenskov 6800 Varde.

Leygardagin 8. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni, Rókur Tummasarson, Tvøroyri og Kristín Baldvinsdóttir, Akureyri. Veitsla verður í AB-húsinum fyri innbodnum.

Leygardagin 8. juli kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Beinta Hilduberg og Martin Heinesen, Tórshavn. Veitslan verður kl. 19.00 fyri innbodnum heima á Djúpagilsvegi 2 í Hoyvík.

Leygardagin 8. juli kl. 13.00 giftast í Hebron í Leirvík, Ella Poulsen, Leirvík og Robert Larsen, Porkeri. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Leygardagin 8. juli kl. 16.00 giftast í Fámjins kirkju Aslaug Joensen og Arnbjørn í Smiðjuni. Veitslan verður í Vesturhøll kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 15. juli kl. 15.00 giftast í Nordfjoreid kirkju í Noregi, Heidi Beate Erviksæter og Thomas Poul Reines Hals, sonur Elsebeth Reines úr Fuglafirði og Per Eirik Hals. Brúdleypsadr.: Erviksæter, 6776 Skjølsdalen, Noreg.

Leygarmorgunin 15. juli kl. 9.00 giftast í Havnar kirkju Katrin J. Lindberg og Rúni Hansen, Tórshavn. Morgunmatur verður fyri innbodnum í Hornahúsinum millum kl. 10.00-12.00.

15. juli kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Annilisa Klevang Pedersen og John Eikhólm.

Leygardagin 22. juli kl. 15.00 giftast í Havnar kirkju, Dorthe Pedersen og Súni Christiansen, bæði úr Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í samkomuhøllini í Føroya Studentaskúla í Hoydølum kl. 19.00.

Leygardagin 22. juli kl. 15.00 giftast í Vestmanna kirkju, Durita Patti, Vestmanna og Pauli Dahl, Fuglafjørður. Veitslan verður fyri innboðin í Høllini í Vestmanna kl. 19.00.

Leygardagin 5. august kl. 16.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Sára Danielsen og Gunnar Olsen, Tvøroyri. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp í Ítróttarhøllini í Trongisvági kl. 19.00 verða biðin um at siga frá á tlf. 221190 ella 371611 eftir kl. 16.00 innan 15. juli.

Leygardagin 5. august kl. 14.00 giftast Maria Elina Kemppainen, Rovaniemi og Marni av Kák Nattestad, Miðvágur í Jätka parkini í Rovaniemi, Finnland. Veitsla fyri innbodnum verður í matstovuni Oppipoika. ***Leygardagin 19. august*** kl. 11.00 verður opið hús í Oasuni, Kirkjustræti 4 í Hoyvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 12. august kl. 14.00 giftast í býráðssalinum í Tórshavn, Guðrið Bogadóttir Vinther, Tórshavn og Magni Jøkladal Hansen, Fuglafjørður. Veitslan verður hildin í Argja Róðrarneysti kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 22. juli á tlf. 316698, 444617, 222248, 504132, ella á telduposti hdesign@post.olivant.fo

Leygardagin 19. august kl. 14.00 giftast í Christianskirkjuni Katrin Sigurðsson, Klaksvík og Hans Pauli Sjóstein, Viðareiði. Veitslan verður á Hotel Norð kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin at siga frá á tlf. 457522, 451006 ella teldupost hkhpja@post.olivant.fo – usks@kallnet.fo áðrenn 1. august.

Leygardagin 19. august kl. 15.00 giftast í Leirvíkar kirkju Beinta Nón, Fuglafjørður og Terji Lervig, Leirvík. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Um tú vilt vera við til at gleða brúðarparið, kanst tú tekna teg við at ringja tlf. 223815, 775456 ella t-post brudleyp@gmail.com áðrenn 6. august.

Leygardagin 19. august kl. 14.00 giftast í Vesturkirkjuni Randi Fríðvør Poulsen, Tórshavn, og Sigurd Hentze, Skopun. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 20. juli á tlf. 322206 ella 222137.

**80 ár**
Týsdagin 11. juli fyllir Solveig Lowe, búsitandi í Onglandi 80 ár. Solveig er dóttir Jens í Skorti í Trongisvági. Familja og kenningar eru vælkomin at heilsa uppá Solveig, leygardagin 8. juli ímillum kl. 13.00 og 17.00 í heiminum hjá Elisabeth og Jákup í Trongisvági.

**85 ár**
Fríggjadagin 7. juli verður Karl Johan Mikkelsen, Tórshavn 85 ár. Tey, ið vilja heilsa uppá Karl Johan eru vælkomin í heimið hjá dóttrini á Mikkjalstrøð 18, frá kl. 18.00.

**90 ár**
23. juli verður Lena Niclasen í Vági 90 ár. Tey, ið vilja gleða Lenu og halda føðingardagin saman við henni leygarkvøldið 22. juli kl. 19.00 á Bakkanum, biðjast vinarliga siga frá á tlf. +45 38100310 (Fríðbjørg ella +45 20251967 (Eyðbjørg) helst áðrenn 10. juli.

**Hebron, Argir**
Mikudagin kl. 20 verður bønarløta.
Sunnudagin kl. 10.30 verður morgunmøti og samstundis barnaansing. Á møtinum luttaka trúboðararnir Ivor og Guðrun Tutty.
Sunnudagsskúlin er í summarfrí. www.hebron.fo

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Gudstænasta v/ Marna Nattestad.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti. Verið hjartaliga vælkomin. www.oasan.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti: Sunnumorgunin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangeliskt møti
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag, kl. 17.00 Tímabøn.
Í morgin kl. 6.00 Morgunbøn.
Fríggjadagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10.45 Morgungudstænasta - Hildibrandur Olsen talar.
www.filadelfia.fo

**Ebenezer**
Mikudagin kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti - Evni: Ápostlasøgan.
Leygardag kl. 20.00 Ungdómsmøti - Einar Vang hevur eitt orð.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting - Evni: Ápostlasøgan, kl. 18.00 Evangel. møti - Evni: Ápostlasøgan.
www.ebenezer.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjadagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 22.00 Útimøti á Vaglinum.
www. gospel.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.00 Møti.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v/ Tummas Lauritsen.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Mikudagin kl. 15.00 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Møti.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Hósdagin verður konsert í Mariukirkjuni kl. 19.30.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa og barnadóp v/ Benny Blumensaat, prestur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. www.katolsk.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v/ Hera Elttør - tala verður á donskum. Brynhild Petersen syngur. Øll vælkomin.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Í summarhálvuni hava vit onki morgunmøti.
Kvøldmøti hvønn sunnudag kl. 18.00. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Mikudagin kl. 20.00 Bøn í Saron og Útimøti kl. 21.00. Verið hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti.

**Missiónshúsið, Libanon**
Um viðrar, verður útimøti niðri í bygdini í Sørvági sunnukvøldið 9. juli, kl. 18.00.

**Kedron, Sørvágur**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti í kjallaranum.
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting við uppingingarmøti verður kl. 11.00.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagin 5. juli kl. 20.00 Bíbiltími. Øll vælkomin.




Starvsfólk
TIL PERLUNA Í SMS

Fulla tíð og aftaná skúlatíð

Søkt verður eftir fólki M/K í aldrinum 16-30 ár til fulltíðarstarv og at arbeiða aftaná skúlatíð - at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara.
Vit gleða okkum at hoyra frá tær...



Send umsóknina til:
Perlan, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.

Perlan